| | | |
|---|---|---|
| | **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**20. desember 2006** | Blað nr.:<br>6835 |
| | | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **20. desember 2006** **kl. 18.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 219/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Jan Christiansen
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**

**LUTTÓK EISINI:**
Jákup Egholm Hansen
Eyðbjørn Larsen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM:**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**219/06** **<u>2002-2008</u>**

**<u>Umsókn frá Sp/f HMP Consult vegna Sigert Patursson um byggiloyvi til fjósabygging v.m.</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sp/f HMP Consult søkir, 2. september 2002, vegna bóndan á Vatnaskørðum Sigert Patursson, festari um byggiloyvi til fjós til 60 mjólkineyt við tilhoyrandi goymslu til hoyggj/gras og amboð við núverandi bóndagarð á Vatnaskørðum. Játtan er fingin frá Føroya Jarðarráði.

Talan er um ein fjósbygning 22 m x 77 m til støddar við tilhoyrandi køsti, sum hevur ein diametur upp á 20 m.

Vísandi til tær býarplanleggingar, sum kommunan hevur fyri Hoyvíkshagan, er væntandi at bygging av einum so stórum fjósi helst kemur í konflikt við tær ætlanir sum í framtíðini væntandi verða har. Fyri at dríva eitt fjós til 60 mjólkineyt, er helst neyðugt við einum dyrkiøki upp á 300-400.000 m². Kommunan hevur tí skyldu at boða festaranum og Føroya Jarðaráði frá hesi ætlan.

**Tilmæli :**
Tekniski stjóri mælir til at kommunan tekur upp fund við Føroya Jarðarráð og festaran, fyri at fáa útsett støðutakanina til projektið, til heildarætlanin er liðug fyrst í komandi ári.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. desember 2002:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum

**Ískoyti:**
2. september 2002: Sp/f HMP Consult søkir vegna bóndan á Vatnaskørðum Sigert Patursson um byggiloyvi til fjós til uml. 60 mjólkineyt.

20. september 2005: søkir Sigert Patursson av nýggjum um byggiloyvi til leysgongufjós/goymslu. Støddin er uml. 75 x 22 metrar. J. Nr. 2002-2008/27

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at geva byggiloyvi. Kommunan ger samstundis umsøkjaran varugan við, at partar av lendinum, sum liggur til festið, er lagt út sum byggiøki til framtíðar býarvøkstur sambært Heildarætlan fyri Tórshavn dagfest juni 2004.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. oktober 2005:** Samtykt at heita á umsøkjaran um at útvega eina lýsing av framtíðar virkseminum á garðinum og á umsitingina um at kanna og lýsa møgulig árin av virkseminum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til geva loyvi við ávísum treytum, sum umsitingin setur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. desember 2006:** Upprit um umhvørviskrøv, j. nr. 2002-2008/38 var gjøgnumgingið.

Ein meiriluti, Beathe L. Samuelsen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal og Katrin Dahl Jakobsen, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir frá at geva loyvi, vísandi til at økta virksemið fer at verða til stóran ampa fyri framtíðar vøkstur í býnum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til geva byggiloyvi við ávísum treytum, sum umsitingin setur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 19. desember 2006:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Leivur Hansen og Elin Lindenskov, tekur undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býararkitektinum, vísandi til, at umsóknin er í samsvari við almennu byggisamtyktina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen, mælir frá at geva byggiloyvi, vísandi til at økta virksemið fer at verða til stóran ampa fyri verandi bústaðir og fyri framtíðar vøkstur av býnum.

Somuleiðis samtykti nevndin at leggja málið fyri býráðið vísandi til grein 32 í kommunustýrislógini.

Meðan hetta mál var viðgjørt, vóru hesi á fundi:

JA-EL-LH-SO-JC fyri Bjarta Mohr. HM-JEH-JMP-EL-MD

**Býráðið 20 desember 2006:** Fyrst varð atkvøtt um tilmælið frá Jan Christiansen, Beate L. Samuelsen, Sjúrði Olsen og Høgna Mikkelsen um at senda málið til grannahoyring til Eigarafeløgini millum Gilja, Eystan Gil og Hoyvíkshagi Suður, áðrenn endalig støða verðurt tikin, tí talan er um eitt mál av stórum týdningi, ið fall við 4 atkvøðum ímóti og 7 fyri.

Fyri atkvøddu: Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov.

Greiddu ikki atkvøðu: Annika Olsen og Bjarti Mohr

Síðan varð atkvødd um avgerðina í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Bjarti Mohr og Beate L. Samuelsen.

Ímóti atkvøddu: Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |